# Tungar avbjóðingar fyri framman

**Gjáramorgunin var fundur í Fíggjarnevndini, har einasta mál á skránni var val av formanni. Bert eitt uppskot var, og tað var Jøgren Niclasen. Eyðgunn Samuelsen heldur fram sum næstformaður**

Leo Poulsen

Hóast nógv hevur verið fundast í Javnaðarflokkinum og nógv hevur verið umrøtt í miðlunum um, at Eyðgunn Samuelsen skuldi skjótast upp sum formaður í Fíggjarnevdini, so var bert hitt eina uppskotið til formann, tá Fíggjarnevndin hevði fund gjáramorgunin.

- Tað var bert eg í uppskoti, og tí kanst tú siga, at eg varð einmælt valdur til formann í Fíggjarnevndini. Eyðgunn Samuelsen heldur so fram sum næstformaður, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at flokkarnir jú hava býtt málsøkini, hvør fyrisitur hvat í landsstýrinum, og hvør hevur hvønn formanssess í Løgtinginum.

- Og har hevur Fólkaflokkurin formanssessin í Fíggjarnevndini, og tað er eitt hitt mest grundleggjandi í allari samstarvsavtaluni, tí tað er altíð tað, sum er truplast í øllum samgongusamráðingunum, sigur Jørgen Niclasen.



*Jørgen Niclasen er valdur til nýggjan formann í Fíggjarnevdini fyri Anfinn Kallsberg, sum í síðstu viku boðaði frá, at hann gavst í politikki*

Mynd: Álvur Haraldsen

Spurningurin er so, um tað fer at merkjast, at ein nýggjur maður situr á postinum sum fíggjarnevndarformaður.

- Fíggjarnevndin hevur verið eyðkend fyri, at fáa breiðar semjur í Løgtinginum, at tað er ein samd nevnd, og at allir flokkar eru við í semjunum. Hinvegin ber so til at siga, at tað ofta hava verið orrustur millum Fíggjarnevndina øðrumegin og landsstýrið hinumegin, sigur Jørgen Niclasen.

## Søkja semjur

Nýggi fíggjarnevndarformaðurin sigur, at hann fer at gera alt, hann kann, fyri at halda saman upp á Fíggjarnevndina.

- Eg fari at leggja doyðin á at finna semjur í Fíggjarnevdini, men eisini at fáa betri samsvar millum viljan hjá Fíggjarnevndini og landsstýrinum, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at avbjóðingarnar fyri framman er stórar, tó at bert tvey mál í løtuni liggja hjá nevndini.

- Vit skulu longu um tveir mánaðar fáa fíggjarkarmarnar samtyktar fyri komandi ár og fyri komandi fimm árini. Har liggur ein breið politisk semja í Løgtinginum um, at hallið á fíggjarlógini skal verða burtur í seinasta lagi í 2015, so tað verður ein avbjóðing, serliga tá vit vita, at langt er millum meiningarnar um, hvussu vit náa hesum máli, sigur Jørgen Niclasen.

Størsta uppgávan verður tí at finna fram til ta semjuna, har helst allir flokkar skulu vera við.

- Men tað týdningarmesta er at fáa hallið burtur, og tað er ein stór avbjóðing og ein spennandi avbjóðing, sigur nýggi fíggjarnevndarformaðurin, Jørgen Niclasen.

At Anfinn Kallsberg hevur tikið seg úr politikki merkir, at nýggtj nevndarumboð skulu veljast í tær nevndir, har Anfinn Kallsberg hevur umboðað Fólkaflokkin. Flokkurin valdi gjáramorgunin Rodmund Nielsen sum nýggjan løgtingsgrannskoðara, og framman undan er greitt, at Jákup Mikkelsen verður nýggjur limur í Rættarnevndini, meðan Heðin Zachariasen verður varalimur í somu nevnd, og endaliga er Jørgen Niclasen valdur til varalim í Uttanlandsnevndini.

# Trivnaðardagar í Sjóvar kommunu

**Í morgin verða trivnaðardagar í Sjóvar kommunu, har høvuðsdentur verður lagdur á tríggjar fyrilestrar, sum Fróði Madsen fer at halda við heitunum Trivnaður í familjuni, Trivnaður í kommununi og Trivnaður í kirkjuni**

Leo Poulsen

Tað er nýhugsan, tá sjóvarprestur, Símun P. Jacobsen, tók stig til ein trivnaðardag í kommununi.

- Talan er um ein almennan dag, har ikki bert strandingar, men øll fólk, sum hava áhuga fyri degnum og fyrilestrunum, eru vælkomin, sigur Símun P. Jacobsen.

Hann hevur sjálvur verið við í fyrireikingini, sum hevur verið ávegis seinastu tveir mánaðarnar, saman við borgarstjóranum, Arthur Johansen, og umsitingini hjá kommununi.

- Vit hava hildið fleiri fundir, og tað eru í høvuðsheitinum vit, sum hava fyrireikað dagin, men nú upp undir tiltakið eru sjálvandi nógv fólk við í tí praktiska í sambandi við tiltakið, sigur Símun P. Jacobsen.

Ætlanin við tiltakinum er ikki, at kommunan ella kirkjan skulu trína fram, men heldur at finna út av, um tað finnast nakrar eldsálir í kommununi. Og prestur kennir áhuga millum fólk.

- Nú kom skráin í hvørt hús mikudagin, og eg kenni, at fólk eru áhugað í tiltakinum. Nógv spyrja og nógv hava sagt seg vilja verða við í tiltakinum, og tá nú tiltakið kemur út í fjølmiðlunum, verður ein vaksandi áhugi, sigur Símun P. Jacobsen.

## Afturmelding

Spurningurin verður so, hvat verður betri við trivnaðinum eftir at daguin er hildin.

- Fyri tað fyrsta haldi eg tað vera positivt, at vit hava ein opinleika. Vit kunnu sita í smáum bólkum og halda ymiskt, men tað er ikki víst, at alt bygdarfólkið hevur somu meiningar. Við hesum degnum fáa vit kanska nøkur nýggj hugskot at arbeiða við, sigur Símun P. Jacobsen.

Hann heldur, at komast má burtur úr lítlu dunnuhyljunum, skal nakað spyrjast burtur úr.

- Ikki fyrr enn tá fáa vit nakað at arbeiða við og kunnu betra um trivnaðin, og eg eri rættiliga spentur upp á, hvat tað nakk verða, sigur Símun P. Jacobsen.

Endamálið við degnum er tí líka nógv, at fólk melda aftur til fyrireikararnar.

- Eg vóni, at fólk ikki halda seg aftur har, og vit ræðast ikki kritikk, bara talan er um konstruktivan kritikk. Vit eru jú grundleggjandi góð við familjuna, vit eru góð við kommununa og vit eru góð við kirkjuna, og vilja fegin varðveita tey góðu virðir, vit hava. Men vit vilja eisini kunna spyrja, um vit kunnu gera tað betri, og kunnu vit tað, haldi eg, at vit hava skyldu til tað, sigu Símun P. Jacobsen.



*Fróði Madsen skal halda tríggjar fyrilestrar um trivna á trivnaðardegnum, sum Símun P. Jacobsen, prestur, hevur tikið stig til*

Mynd: Jens Kristian Vang

Dagurin byrjar við fyrilestrinum Trivnaður í familjuni klokkan 14 í bygdarhúsinum og aftaná verður kaffi og kjak. Hildið verður fram klokkan 16 við fyrilestrinum Trivnaður í kommununi, síðani aftur kjak, áðrenn ein døgurðabiti verður borðreiddur. Klokkan 18.30 verður so seinasti fyrilesturin sum ber heitið Trivnaður í kirkjuni við fylgjandi kjaki. Tað er Fróði Madsen, sum heldur allar tríggjar fyrilestrarnar og dagurin endar klokkan 20.